Skjal 8
(týðing)

# Avtala millum Føroyar og Jersey um atgongd til sínámillum mannagongdir í sambandi við javning av vinningi hjá sameindum fyritøkum

Føroya landsstýri og stjórnin í Jersey

• sum ynskja at gera avtalu um atgongd til sínámillum mannagongdir í sambandi við javning av vinningi hjá sameindum fyritøkum,
• við atliti at Føroya landsstýri ger hesa avtalu vegna kongaríkið Danmark sambært løgtingslóg um altjóðarættarligu sáttmálar Føroya landsstýri at gera,

eru samd um hetta:

**Grein 1**
**Umfataðir skattir**

Henda avtala skal verða nýtt um skattir av inntøku og vinningum.

**Grein 2**
**ALLÝSINGAR**

1. Fyri hesa avtaluna, uttan so at samteksturin krevur tað øðrvísi:
a) yrkisorðið "ein partur" merkir Føroyar ella Jersey, so sum samteksturin krevur;
yrkisorðið "partar" merkir Føroyar og Jersey;
b) yrkisorðið "Føroyar" merkir føroyska landøkið og sjóøkið rundan um Føroyar og eitt og hvørt øki uttan fyri føroyskt sjóøki, har Føroyar sambært føroyskari lóggávu og sambært altjóða lóg, kunnu útinna rættindi viðvíkjandi havbotninum og undirgrundini og teirra náttúrutilfeingi;
c) yrkisorðið "Jersey" merkir rættarøkið hjá Jersey haruppií sjóøkið rundanum;
d) yrkisorðið "málsráðandi myndugleiki" merkir:
i)í Føroyum: landsstýrismaðurin í fíggjarmálum ella hansara heimilaða varafólk við fulltrú ella tann myndugleiki, sum er tilnevndur sum málsráðandi myndugleiki ætlaður hesari avtaluni;
ii) í Jersey: fíggjar- og tilfeingismálaráðharrin ella hansara heimilaða varafólk við fulltrú.

2. Við atliti at nýtslu av hesi avtalu til eina og hvørja tíð av einum parti, skal eitt og hvørt yrkisorð, sum ikki er útgreinað í henni, uttan so at samteksturin krevur tað øðrvísi, hava merkingina, sum tað hevur til ta tíð eftir lóggávuni í tí partinum viðvíkjandi skattum, sum avtalan verður nýtt til, ein og hvør merking í skattalógunum, sum verða nýttar í tí partinum, skal ganga fram um eina merking, sum eitt yrkisorð hevur fingið í øðrum lógum hjá tí partinum.

**Grein 3**
**Meginreglur viðvíkjandi javning av vinningi hjá sameindum fyritøkum**

1. a) Tá ein fyritøka í einum parti beinleiðis ella óbeinleiðis hevur lut í leiðsluni, eftirliti ella fæfeingi (kapitali)
í einari fyritøku í hinum partinum, ella

b) somu persónar beinleiðis ella óbeinleiðis hava lut í leiðsluni, eftirliti ella fæfeingi (kapitali) í einari fyritøku í einum parti og einari fyritøku í hinum partinum, og í onkrum føri umstøður eru gjørdar ella álagdar millum tær báðar fyritøkurnar í teirra handilsligu ella fíggjarligu sambondum, sum víkja frá teimum, sum høvdu verið gjørdar millum óheftar fyritøkur, tá kann ein og hvør vinningur, sum hevði, um ikki hesar umstøðurnar vóru, verið tillutaður aðrari fyritøkuni, men, orsakað av hesum umstøðunum, ikki er vorðin tilllutaður soleiðis, verða íroknaður vinninginum hjá teirri fyritøkuni og skattaður samsvarandi.

2. Tá ein partur íroknar í vinningin hjá einari fyritøku í sínum parti – og roknar skatt av honum samsvarandi – vinning, sum ein fyritøka í hinum partinum hevur verið sett í skatt eftir í tí partinum, og hesin soleiðis íroknaði vinningurin er vinningur, sum hevði verið tillutaður fyritøkuni í fyrstnevnda partinum, um tær umstøðurnar, sum gjørdar vóru millum báðar fyritøkurnar, høvdu verið tær somu, sum høvdu verið gjørdar millum óheftar fyritøkur, tá skal hin parturin gera eina hóskandi javning í skattaupphæddini, sum er kravd í honum av hesum vinningi. Til ásetingar av slíkari javning skal vera skylda at hava atlit at øðrum viðtøkum í hesi avtalu.

**Grein 4**
**Vanligar viðtøkur**

Tá ein partur ætlar at javna vinningin hjá einari fyritøku samsvarandi meginreglunum, sum ásettar eru í grein 3, skal hann í samsvari við sína lóggávu kunna fyritøkuna um ta ætlaðu fyriskipanina í góðari tíð og geva henni møguleikan at kunna hina fyritøkuna fyri hin vegin at geva hinari fyritøkuni møguleikan at kunna hin partin. Men parturin, sum kemur við slíkari kunning, skal ikki verða forðaður í at gera ætlaðu javningina.

**Grein 5**
**MANNAGONGD Í SÍNÁMILLUM AVTALU**

1. Tá ein fyritøka metir, í einum og hvørjum máli har henda avtalan verður nýtt, at fyriskipanir hjá øðrum partinum ella báðum pørtunum føra við sær ella fara at føra við sær tvískatting fyri hana, kann hon, uttan mun til hvørji rættarlig ráð verða veitt í innanhýsis lóggávuni hjá viðkomandi parti, leggja mál sítt fyri málsráðandi myndugleikan í tí partinum, har hon er búføst (skrásett). Málsráðandi myndugleikin skal tá uttan drál kunna málsráðandi myndugleikan í hinum partinum.

2. Málsráðandi myndugleikin skal, um tað vísir seg fyri honum at vera grund fyri mótmælinum, og um hann ikki einsamallur er førur fyri at koma fram til eina nøktandi loysn, royna at loysa málið við avtalu sínámillum við málsráðandi myndugleikan í hinum partinum, við tí sjónarmiði at sleppa undan skattaáseting, sum ikki er í samsvari við avtaluna. Ein og hvør avtala, sum komið er fram til, skal verða sett í verk uttan mun til nakrar tíðarfreistir í innanhýsis lóggávuni hjá pørtunum.

3. Málsráðandi myndugleikarnir í pørtunum skulu royna við avtalu sínámillum at loysa allar trupulleikar ella øll ivamál, sum taka seg upp viðvíkjandi tulking ella nýtslu av avtaluni.

4. Málsráðandi myndugleikarnir í pørtunum kunnu samskifta beinleiðis hvør við annan við tí endamáli at koma fram til eina semju, sum er í tráð við stykkið frammanfyri.

**Grein 6**
**ÍGILDISKOMA**

1. Henda avtalan kemur í gildi tríatiunda dagin eftir ta seinru dagfestingina, tá hvør av pørtunum hevur gjørt hinum kunnugt skrivliga, at tær kravdu mannagongdirnar sambært sínari lóggávu eru loknar. Avtalan skal vera galdandi fyri skattir, sum kunnu verða kravdir inn fyri eitt og hvørt skattaár, ið tekur við tann fyrsta ella eftir tann fyrsta dagin í januar í tí álmanakkaárinum, sum kemur eftir tað árið, tá ið avtalan kemur í gildi.

2. Uttan mun til stykki 1 í hesi grein skal avtalan bert kunna verða nýtt, tá ið avtalan, undirskrivað tann 28. oktober 2008 millum Jersey og Føroyar um umbýti av upplýsingum viðvíkjandi skattamálum, skal vera galdandi.

**Grein 7**
**UPPSØGN**

1. Hendan avtala verður verandi í gildi, inntil hon verður uppsøgd av øðrum partinum. Hvør partur kann siga avtaluna upp við at geva skrivlig boð um uppsøgn í minsta lagi seks mánaðir innan, eitt og hvørt álmanakkaár er komið at enda. Í slíkum føri skal avtalan halda uppat at vera galdandi fyri skattir, sum kunnu verða kravdir inn fyri eitt og hvørt skattaár, sum tekur við tann fyrsta ella eftir tann fyrsta dagin í januar í tí álmanakkaárinum, sum kemur, eftir at seks mánaða tíðarskeiðið er runnið.

2. Uttan mun til stykki 1 í hesi grein verður henda avtalan uppsøgd, uttan at boð verða givin um uppsøgn, frá dagfestingini av uppsøgnini av avtaluni, undirskrivað 28. oktober 2008 millum Jersey og Føroyar um umbýti av upplýsingum viðvíkjandi skattamálum.

Til staðfestingar av hesum hava undirritaðu við fullgóðari heimild til tað skrivað undir hesa avtalu.

Skrivað í Helsinki, tann 28. oktober 2008, í tveimum eintøkum á enskum máli.

Vegna Føroya landsstýri:
Jóannes Eidesgaard

Vegna stjórnina í Jersey:
Frank Walker